**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 82/2019: Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin)**

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 6. mars 2020, og eftir 1. viðgerð 21. apríl 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. og 30. apríl og 5. og 7. mai 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Sosialráðgevarafelag Føroya, Fysioterapeutfelagið saman við Ergoterapeutfelagnum, Felagið Hoyr, MEGD saman við Javna, Heilafelagnum og ADHD-felagnum, Kommunufelagið, Kriminalforsorgina, MFS og tvær ferðir við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, har av fyrru ferð saman við Almannaverkinum.

Trivnaðarnevndin hevur hesar viðmerkingar:

At taka frælsi frá fólki er sera álvarsamt og ger seg inn á grundleggjandi menniskjarættindi. Trivnaðarnevndin ásannar tó, at tað í heilt ávísum førum kann vera neyðugt at gera tað. Eisini fyri at verja borgaran og fyribyrgja skaða.

Tað er alneyðugt at hava stranga lóggávu og vegleiðingar um frælsistøku, og at frælsistøka er so avmarkað, sum yvirhøvur ber til. Tað er eisini neyðugt í lóggávuni at tryggja at fólk, sum verða frælsisskerd eru tað so stutt sum gjørligt, at tey ongantíð eru einsamøll, at tey kunnu kæra o.a.

Trivnaðarnevndin heitir á landsstýrismannin um at virka fyri, at skrivligar mannagongdir vera á ymisku stovnunum, har gjørt verður púra greitt, hvussu frælsistøka kann fara fram. Um at virka fyri, at øll starvsfólk vera undirvíst og upplærd í lógarásetingunum og í samskifti og umsorgan, sum kann fyribyrgja, at støður uppstanda, sum kunnu føra til, at frælsi verður tikið frá fólki.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 7. mai 2020**

| | |
|---|---|
| Uni Rasmussen<br>formaður | Sirið Stenberg<br>næstformaður |

Aksel V. Johannesen Hervør Pálsdóttir Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen Erhard Joensen